# Reglugerð um størv á Fróðskaparsetri Føroya

## Innihaldsyvirlit


Reglugerð um størv á Fróðskaparsetri Føroya ..... 2
Grein 1 ..... 2
Rektari, vararektari, prorektari og fyrisitingarstjóri ..... 2
Grein 2 ..... 2
Dekanar ..... 2
Grein 3 ..... 3
Vísindalig granskingar- og undirvísingarstørv ..... 3
Grein 4 ..... 3
Føst størv ..... 3
Grein 5 ..... 4
Tíðaravmarkað størv ..... 4
Grein 6 ..... 4
Adjungerað og tímalønt ..... 4
Grein 7 ..... 5
Fyrisitingarlig og tøknilig størv ..... 5
Grein 8 ..... 5
Tilnevningar (metingarnevnd og setanarnevnd) og framflyting ..... 5
Grein 9 ..... 5
Grein 10 ..... 6
Tíðaravmarkað undantøk ..... 6
Grein 11 ..... 6
Arbeiðstíð og arbeiðsviðurskifti ..... 6
Grein 12 ..... 6
Fylgiskjøl ..... 8
1. Starvið hjá rektaranum ..... 8
2. Leikluturin hjá vararektaranum ..... 9
3. Leikluturin hjá prorektarunum ..... 9
4. Starvið hjá fyrisitingarstjóranum ..... 10
5. Leikluturin hjá dekaninum ..... 11
6. Leikluturin hjá varadekaninum ..... 12
7. Leikluturin hjá útbúgvingarleiðarum ..... 12

8. Leikluturin hjá granskingarleiðaranum á deildini ........ 13
9. Starvið hjá professarum ........ 14
10. Adjungerað støry ........ 14
Mannagongd og kravd skjalfesting fyri framflytingar millum undirvísingarstørv og granskingarstarvslið ........ 16

## Reglugerð um størv á Fróðskaparsetri Føroya
(desember 2023)

Hetta skjal er eitt høvuðsyvirlit yvir størvini á Fróðskaparsetri Føroya við reglugerðum og starvslýsingum, ið hoyra til, umframt mannagongdum fyri starvssetan og framflyting. Endamálið við hesum størvum er at fremja í verki lyfti og raðfestingar Setursins, sum eru orðaðar í *Málum og miðum 2020-2024*, og væntað verður av hvørjum einstøkum starvsfólki, at tey geva eitt nøktandi íkast samsvarandi starvinum, tey hava.

Tá ið hesi størv verða sett ella umskipað, og tá ið størvini verða útint, hevur Setrið skyldu at tryggja javnbjóðis møguleikar, medábyrgd og trivnað í einum umhvørvi, har øll mennast og taka seg fram. Yvirskipað eiga øll starvsfólk á Setrinum at bera seg professionelt at og altíð halda reglur Setursins um at vísa virðing og umhugsni fyri øðrum.

Hetta skjal skilir ímillum tvær ymsar starvssetanir – størv (til dømis lektari ella fyrisitingarstjóri), sum eru størv í sjálvum sær, og leiklutir (so sum útbúgvingarleiðari, varadekanur ella granskingarleiðari), sum verða tillutaðir starvsfólki, sum longu eru í starvi, og sum verða røktir saman við tí starvi, tey longu hava.

Skjalið verður dagført, so tað endurspeglar, hvussu Setrið mennist, og allar broytingar verða lagdar fyri stýrið og góðkendar har.

### Grein 1

#### Rektari, vararektari, prorektari og fyrisitingarstjóri

*1.1* Stýrið setir **rektara**. Rektarin hevur ábyrgd av dagligum rakstri og leiðslu á Fróðskaparsetrinum innan fyri teir karmar, sum stýrið hevur ásett, og sambært ásetingunum í rektarafyriskipanini (sí fylgiskjal 1). Rektarin er settur fyri fimm ár, sum til ber at leingja upp í trý ár.

Leiklutin sum **vararektara** (sí fylgiskjal 2), leiklutirnar sum **prorektarar** (prorektara fyri Góðskueindina og prorektara fyri Granskingar- og framtakseindina, sí fylgiskjal 3a og 3b), dekan (kann antin vera leiklutur ella starv) og fyrisitingarstjóra setir stýrið eftir tilmæli frá rektara. Vararektari og prorektarar verða vanliga valdir millum dekanarnar í eitt tríáraskeið.

Øll onnur størv setir rektarin eftir tilmæli frá nevndum (lýstar í hesum skjali), ið rektarin frammanundan hevur sett.

Fyrisitingarstjórin er ovasti leiðari í samlaðu umsitingini á Fróðskaparsetrinum innan fyri teir karmar, stýrið og rektarin hava ásett, og sambært ásetingunum í fyriskipanini fyri fyrisitingarstjóran (sí viðfesti 4). Fyrisitingarstjórin vísir beinleiðis til rektaran.

### Grein 2

#### Dekanar

*2.1* Gransking og undirvísing fer fram á deildum Setursins. Hvussu nógvar deildirnar eru, sum stýrið góðkennir, og hvussu tær verða skipaðar, kann stundum broytast. Vanliga verður

**dekanur** tilnevndur millum starvsfólkið fyri eitt tríáraskeið, sum kann verða longt. Dekanurin hevur alla ábyrgdina av fyrisitingini, akademiska virkseminum og deildarleiðsluni. Dekanar vísa beinleiðis til rektaran. Til ber at lýsa eftir dekani uttanhýsis og seta uttanhýsis umsøkjara í starvið, annaðhvørt tíðaravmarkað ella fast. Tá er tað starv heldur enn leiklutur.

*2.2* Dekanar eiga at veita vissu fyri, at viðkomandi starvsfólk á deildini og á Setrinum sum heild granska og undirvísa á høgum stigi, og at neyvt samband er millum báðar partar, fyri at tryggja, at øll undirvísing er grundað á gransking. Eisini eiga dekanar at tryggja, at øll gransking, undirvísing, umsiting og alt gerandisvirksemi á deildini verður útint eftir teimum reglum, fyriskipanum og stevnumiðum, ið Fróðskaparsetur Føroya hevur sett sær. Fleiri nágreiniligar ásetingar standa í fyriskipanini fyri dekanar (sí viðfesti 5).

*2.3* Dekanar kunnu, treytað av góðkenning rektarans, útnevna varadekan (sí fylgiskjal 6), útbúgvingarleiðara (sí fylgiskjal 7) og granskingarleiðara (sí fylgiskjal 8) umframt seta størv og leiklutir á deildini so sum leiðarar fyri starvstovum, søvnum, deplum og stovnum.

*2.4* Dekanar eiga at tryggja, at útbúgvingarleiðarar og skeiðsleiðarar standa fyri at fyrireika og javnan dagføra útbúgvingar- og skeiðslýsingar, sum samsvara við tær góðkendu námsskipanirnar, ið eisini javnan verða endurskoðaðar saman við Góðskueindini á Setrinum.

2.5 Dekanar eiga í samstarvi við Granskingar- og framtakseindina á Setrinum at tryggja, at granskingarleiðarar og granskarar geva eitt íkast, ið samsvarar við størvini, tá ið talan er um granskingarleiðslu og -úrslit.

## Grein 3

### Vísindalig granskingar- og undirvísingarstørv

*3.1* Minstakravið til granskarar og undirvísarar á Fróðskaparsetrinum er kandidatprógv ella masterprógv sambært Bolognaavtaluni. Tó er vaksandi krav um ph.d.-prógv. Starvsfólk í granskingar- og undirvísingarstørvum, ið ikki hava ph.d.-prógv, verða eggjað til at fara undir tað.

## Grein 4

### Føst og tíðaravmarkað størv

*4.1* Føst og tíðaravmarkað vísindalig størv eru: Professari, lektari, námslektari og vísindaligt hjálparfólk.

*4.2* Professarar skulu hava besta vísindaliga og fakliga førleika, góðan pedagogiskan førleika og hollar fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing og gransking. Professarar hava evstu fakligu ábyrgdina av sínum fakøki. Professarar hava, undir umsjón frá dekani, serliga ábyrgd av góðskuni í gransking og undirvísing á sínum øki og at stuðla starvsfeløgum í fakligari menning. Professara kann verða álagt at taka á seg leiðsluábyrgd og fyrisitingarligar uppgávur sum ein part av starvinum. Meira stendur um krøv til professarar í fylgiskjali 9.

*4.3* Lektarar skulu hava sera góðan vísindaligan og fakligan førleika á sínum øki. Lektarar skulu eisini hava góðan pedagogiskan førleika og fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing og gransking. Lektara kann verða álagt at taka á seg leiðsluábyrgd og fyrisitingarligar uppgávur sum ein part av starvinum.

4.4 Námslektarir skulu hava góðan fakligan førleika, rímiligan vísindaligan førleika og fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing, men fyrst og fremst góðan pedagogiskan førleika og vera góðir undirvísarar grundað á nýggja gransking á avvarðandi vísindaøki. (miðað verður ímóti, at námslektarar hava ph.d.-prógv) hjálpa til við at loysa fyrisitingarligar uppgávur á deildini. Námslektarar hava vanliga ikki granskingarskyldu, men kunnu frá dekani fáa tillutað granskingartíð einahelst at arbeiða við ávísum verkætlanum og til at loysa seruppgávur.

Námslektara kann verða álagt at taka á seg leiðsluábyrgd og fyrisitingarligar uppgávur sum ein part av starvinum.

4.5 Aðrar nágreiningar fyri professarar, lektarar og námslektarar eru at finna í starvslýsingunum fyri hvørt starvsheiti á ymsu deildunum.

4.6 Førleikar, uppgávur og lýsing av tí, sum verður væntað av **vísindaligum hjálparfólkum**, verður nágreinað í teimum avvarðandi starvslýsingunum.

## Grein 5

### Tíðaravmarkað størv

5.1 Tíðaravmarkaðu granskingar- og útbúgvingarstørvini eru: Adjunktur, ph.d.-studentur, ph.d.-vísindastarv og postdoc-granskari. Eisini her eru neyvari nágreiningar at finna í starvslýsingunum fyri hvørtstarvsheiti á ymsu deildunum.

5.2 Adjunktstarvið er eitt tíðaravmarkað undirvísingar- og granskingarstarv, sum kann gerast fast starv sum lektari, um lektaratreytirnar verða hildnar innan fyri tíðarásetingina. Fyri at verðasett/ur í starv sum adjunktur er ph.d.-útbúgving eitt krav.

Adjunkttíðin er vanliga 3-4 ár og kann verða longd upp til 12 mánaðir, um umstøðurnar tala fyri tí. Tað er treytað av, at semja er um eina virkisætlan fyri longda tíðarskeiðið. Virkisætlanin skal greidliga benda á, at adjunkturin sannlíkt fer at standa seg í lektarametingini innan fyri ásettu tíðina.

Eisini ber til at verða sett/ur sum adjunktur ella lektari við serligum denti á gransking og granskingararbeiði (t.d. um starvið heilt ella fyri ein part er uttanhýsis fíggjað).

Minst tríggjar mánaðir áðrenn adjunkttíðin gongur út, skal adjunkturin lata seg lektarameta (mannagongd og kravt skjalprógv sí 8.5 niðanfyri og fylgiskjal 10). Adjunkturin kann verða settur í starv sum lektari, um metingin er góð, og um umstøðurnar loyva tí. Lektarametingin kann verða treytað; tað merkir, at adjunkturin fær upp til 6 mánaðir at gera ávís avrik liðug. Um adjunkturin ikki verður settur í lektarastarv, endar starvssetanin, tá adjunkttíðin er farin.

5.3 Serreglur galda fyri ph.d.-studentar (sí avvarðandi kunngerð) og fyri postdoc-granskarar.

5.4 Ph.d.-vísindastarvið er eitt tíðaravmarkað, vísindaligt granskingarstarv, ið serliga er ætlað sum førleikamenning fyri starvsfólk á Setrinum, hvørs endamál er at lyfta tey upp í eitt hægri vísindaligt granskingarstarv. Umframt førleikakrøvini í § 4 um upptøku í ph.d. kunngerðini, eru royndir við undirvísing eisini eitt førleikakrav.

Ph.d.-vísindastarvið er eitt 4 ára starv, 50 % er til gransking, og hin helvtin er til undirvísing og aðrar viðkomandi uppgávur umframt at taka tey kravdu ph.d. skeiðini.

Ph.d.-vísindastarvið er lønt eins og námslektarastørv.

Eftir lokna ph.d. útbúgving og minst tríggjar mánaðir áðrenn ph.d. vísindastarvstíðin gongur út, skal ph.d. vísindastarvsfólkið senda eina umsókn um framflyting til adjunktstarv, sí mannagongd um framflytingar í grein 10 c.

5.5 Postdoc starvið er eitt tíðaravmarkað, vísindaligt granskingarstarv, hvørs endamál er at førleikamenna starvsfólkið til hægri vísindaligt granskingarstarv. Førleikakravið er ph.d. støði. Høvuðsarbeiðsuppgávan er gransking (t.d. 70%), men krøv til undirvísing kunnu eisini vera í avmarkaðari nøgd (t.d. 20%). Harafturat kann roknast við, at tann setti í minni mun eisini skal loysa aðrar uppgávur (t.d. 10%).

Vísindastarvsfólk við ph.d.-útbúgving vera sett í eitt tíðaravmarka postdoc starv, har:

- Setanartíðin er vanliga millum 1 og 2 ár og kann í mesta lagi vera 4 ár.
- Postdoc vísindastarvsfólkið skal menna sín granskingarvanga í samsvar við mannagongdir á viðkomandi deildini.
- Postdoc vísindastarvsfólkið skal menna sínar førleikar at fáa til vega uttanhýsis fígging (eitt nú sum samsøkjari) og fígging yvirhøvur í samband við smærri verkætlanir.

- Postdoc vísindastarvsfólkið skal menna sínar førleikar at leiða granskingarverkætlanir.
- Postdoc vísindastarvsfólkið skal menna sína førleikar at undirvísa og vegleiða BA og MA lesandi, umframt at (hjálpar-)vegleiða ph.d. lesandi.
- Postdoc vísindastarvsfólkið hevur ein fakligan ráðgeva (mentor) at stuðla seg til í setanartíðini.

Ein ætlan skal fyriliggja fyri starvstíðina, herundir verkætlanarlýsing fyri granskingarverkætlanina umframt lýsing av undirvísingaruppgávum og øðrum uppgávum saman við meting av vavinum av hesum uppgávum. Ætlanin skal innihalda upplýsingar um, hvør er fakligur ráðgevi (mentor) hjá postdoc vísindastarvsfólkinum og hvørjar uppgávurnar hjá viðkomandi eru. Ætlanin eigur at vera klár við starvssetan og skal í seinasta lagi vera klár 1 mánað eftir starvssetan.
Postdoc vísindastarvsfólkið hevur ábyrgd av at fáa fígging til vega til arbeiðsútreiðslur, ferðir og ráðstevnur og í samband við útreiðslur tengdar at visting í øðrum granskingarumhvørvi í Føroyum ella uttanlanda.
Postdoc vísindastarvsfólkið verður sett og lønt sambært stigatalvu og sáttmála hjá Akademikarafelagnum.

## Grein 6

### Adjungerað og tímalønt

*6.1* Tíðaravmarkað vísindalig størv eru: adjungeraður professari, adjungeraður lektari og adjungeraður námslektari. Tað, sum verður væntað av starvsfólkinum, og setanartilgongdin fyri adjungerað størv verður lýst í fylgiskjølunum 10a og 10b.

*6.2* Tey akademisku og yvirskipaðu krøvini til føst størv eru eisini galdandi fyri adjungerað størv.

*6.3* Fyri tímalærarar og tímalønt vísindalig hjálparfólk eru serligar reglur galdandi, sum eru útgreinaðar á heimasíðu Setursins. Avtala verður gjørd við hesi starvsfólkini í hvørjum føri sær.

## Grein 7

### Fyrisitingarlig og tøknilig størv

*7.1* Fyrisitingarligu og tøkniligu størvini á Setrinum krevja ymiskar útbúgvingar og førleikar. Krøvini verða nágreiniliga lýst í skjali, sum er grund undir starvinum, og í sjálvari starvslýsingini. Rektarin setir øll hesi størv, tó ikki fyrisitingarstjórastarvið, sum stýrið setir eftir tilmæli rektarans.

## Grein 8

### Tilnevningar (metingarnevnd og setanarnevnd) og framflyting

*8.1.* Rektarin setir eftir tilmæli frá dekaninum eina setanarnevnd at tilnevna undirvísingar- og granskingarstørv (undantikið námslektarastørv). Uppgávan hjá setanarnevndini er fyrst og fremst at meta væl og vandaliga, um akademisku førleikarnir hjá umsøkjarunum hóska til ætlaða starvið, um granskingaráhugamálini og granskingarførleikin hjá umsøkjarunum eru viðkomandi fyri Setrið, og um møguleiki er fyri samstarvi innan- og uttanhýsis Setrið. Setanarnevndin skal handa rektaranum eitt tilmæli grundað á metingina við uppskoti um, hvørjar umsóknir eiga at vera latnar metingarnevndini til viðgerðar, §8, stk. 2.

8.2 Sum víst í §8, stk. 1 setir rektarin eftir tilmæli frá viðkomandi dekani eisini eina metingarnevnd, vanliga við trimum ella fýra fólkum, og í minsta lagi tvey teirra koma av øðrum universiteti ella granskingarstovni. Limirnir í hesi nevndini skulu hava útbúgving og førleikar á minst sama støði, sum kravt verður til starvið, mett verður um. Uppgávan hjá metingarnevndini er at meta um akademiskar førleikar, evni og dugnaskap hjá umsøkjarum samanborið við krøvini í starvslýsingini eins og allar serstakar ásetingar og forskriftir, sum eru galdandi fyri starvið. Metingarnevndin skal koma við eini meting av førleikunum hjá umsøkjarunum, sum eru tilvístir til metingar, og eini raðfesting av teimum, sum nevndin metir vera skikkaðar. Rektarin setir forfólkið í metingarnevndini, sum skal vera valt innanhýsis á Fróðskaparsetrinum. Forfólkið samskipar arbeiðið hjá nevndini og veitir vissu fyri, at metingin er nóg væl skjalprógvað og samtykt av allari nevndini.

8.3 Síðan tekur setanarnevndin í sínum arbeiði støði í akademisku og fakligu metingini hjá metingarnevndini. Fyrst verða umsøkjarar valdir til samrøðu í einari tilgongd at gera ein úrvalslista, síðan verða samrøður gjørdar við teir úrvaldu umsøkjararnar. Arbeiðslagið í setanarnevndini er víðfevnt, og nevndin handar rektaranum eitt tilmæli um, hvør umsøkjari sum heild er best skikkaður til tað tøka starvið umframt at vísa á hóskandi umsøkjarar at hava til at taka, um neyðugt.

8.4 Til undirvísingar- og granskingarstørv, ið eru styttri enn eitt ár, kann rektarin gera undantak frá kravinum um eina metingarnevnd, tað vil siga, at allar umsóknir verða mettar av eini setanarnevnd sambært grein 9.

8.5 Hjá starvsfólki í undirvísingar- og granskingarstørvum, ið vilja verða flutt úr adjunktstarvi til lektara ella úr lektarastarvi til professara, eru leiðreglur, mannagongd og fullfíggjað ætlan í fylgiskjali 10.

## Grein 9

9.1 Til onnur størv enn granskingar- og undirvísingarstørv útnevnir rektarin eina setanarnevnd eftir tilmæli frá viðkomandi dekani, fyrisitingarstjóra ella HR-leiðara. Setanarnevndin metir umsóknir sambært vanligum fyrisitingarligum mannagongdum fyri tað almenna í Føroyum. Dekanurin, fyrisitingarstjórin ella HR-leiðarin letur rektaranum eitt tilmæli við tilskilan til, hvør umsøkjari er best skikkaður til starvið við støði í einum umfatandi yvirliti yvir økið. Rektarin hevur, eins og tá ið tað snýr seg um granskingar- og undirvísingarstørv, ta endaligu avgerðina og velur ein umsøkjara til starvið.

*9.2* Verkætlanarstørv so sum ph.d. ella postdoc verða sett eftir serligum avtalum og í samráði við rektaran.

## Grein 10

### Tíðaravmarkað undantøk

*10.1* Í heilt serligum førum og við góðari grundgeving kann rektarin loyva avmarkaðum undantøkum frá reglunum omanfyri. Rektarin kann eisini í serligum førum seta fólk í fast starv í upp til eitt ár. Slík setan kann kortini bara í heilt serligum førum leingjast og bara við heilt greiðari tíðaravmarking.

## Grein 11

### Arbeiðstíð og arbeiðsviðurskifti

*11.1* Arbeiðstíðin hjá fólki í vísindaligum granskingar- og undirvísingarstørvum er býtt í granskingartíð, undirvísingartíð og fyrisiting. Í øllum trimum táttunum alt eftir starvsstigi og løn er framleiðsluskylda, ið skal skjalprógvast og góðkennast av avvarðandi dekani, sum hevur ábyrgd av, at tað verður skjalprógvað, og at avhendingarskjølini verða avhendað.

*11.2* Øll í starvi á Setrinum fáa setanarbræv við greiðum starvstreytum og starvsskyldum. Rektarin kann eftir tilmæli frá dekani, fyrisitingarstjóra ella eftir umbøn frá tí einstaka starvsfólkinum broyta arbeiðstíðarlutfallið millum undirvísing, gransking og fyrisiting.

Tey í tilnevndum størvum (so sum prorektari, varadekanur, útbúgvingarleiðari ella granskingarleiðari) fáa eisini eitt tilnevningarskriv og eina lýsing av leiklutinum.

## Grein 12

*12.1* Fróðskaparsetrið rindar somu førleikagrundaðu løn á øllum deildum Setursins, og tað merkir: tess betri akademiskan ella fakligan førleika, tess hægri løn. Fróðskaparsetrið tryggjar sær eisini, at starvsfólk veita íkast til arbeiðið á stovninum samsvarandi teirra førleikum og lønarstigi (sí eisini §11, stk. 1). Lønarviðbót verður latin fyri fyri øll serskild størv ella leiðsluuppgávur, so sum uppgávur tilskilaðar leiklutunum sum varadekanur, útbúgvingarleiðari ella granskingarleiðari.

*12.2* Yvirtíðar- ella úrtíðarløn verður bert latin við loyvi frá rektaranum eftir tilmæli frá dekani ella fyrisitingarstjóra.

*12.3* Fróðskaparsetrið samráðist um lønarflokkar við Føroya Gjaldstovu. Saman við fakfeløgunum og lønardeildini miðar Fróðskaparsetrið ímóti at viðurkenna og raðfesta yrkisliga

menning í lønarsamráðingum. Professionaliseringin av Fróðskaparsetrinum hevur yvirhøvur høga raðfesting í *Málum og miðum 2020-2024*.

**Samtykt á stýrisfundi 10. november 2023**
**(kemur í staðin fyri útgávuna samtykt av stýrinum 24. november 2022 og upprunaligu reglugerðina, ið undanfarna stýri samtykti 17. mai 2016)**

## Fylgiskjøl

### 1. Starvið hjá rektaranum

**Rektarafyriskipan**
Samtykt á stýrisfundi 17. mars 2010

#### *Ábyrgd og myndugleiki*

- Rektarin hevur dagligu leiðsluna á Fróðskaparsetrinum innan fyri teir karmar, sum stýrið hevur ásett.
- Rektarin hevur vegna stýrið yvirskipaðu ábyrgdina og leiðsluna av virkseminum á Setrinum og hevur umsjón við tí.
- Rektarin er rættarumboð fyri Setrið, løgligt umboð og talsfólk fyri Setrið mótvegis almennu myndugleikunum og úteftir til almenningin. Í stakmálum kann rektarin tilnevna varafólk í sítt stað.
- Rektarin, og í hansara stað vararektarin, hevur rætt til at vera við á fundi í øllum stýrum, ráðum og nevndum á Setrinum.
- Rektarin ger í samráð við stýrisformannin úrskurð í málum, sum ikki kunnu bíða, til setursstýrið kemur saman til fundar. Rektarin tekur avgerð í ávegissøkum, sum eiga at vera avgjørdar undan næsta regluliga stýrisfundi, og sum ikki eru nóg umráðandi til, at kallað verður inn til eykafundar.
- Rektarin hevur ábyrgdina av at seta í verk tær viðtøkur, sum gjørdar verða í leiðslueindunum á Setrinum, og at umsita tilfeingi og ognir í samsvari við viðtøkurnar hjá stýrinum.
- Rektarin setur og loysir úr starvi starvsfólk á Setrinum, tó so at stýrið setur og loysir úr starvi dekanar og fyrisitingarstjóra eftir tilmæli frá rektara.
- Rektarin hevur vanligan fíggjaravgerðarrætt (ávísingarmyndugleika) og er rættargildur til at binda Setrið fíggjarliga (gera avtalur og veita tilsøgn um pening), íroknað at skriva bindandi skjøl um ognir Setursins.

#### *Aðalstarvssetningur*

- Rektarin skal leiða og menna heildararbeiðið bæði innan fyri gransking og fakliga menning og innan fyri útbúgvingar- og miðlanarvirksemið á Setrinum, ið eisini eiga at syrgja fyri, at ætlanir og mál hjá Setrinum eru dagførd og framsøkin.
- Rektarin skal syrgja fyri, at strategi og mál hjá Setrinum verða sett í verk á øllum stigum á Setrinum.
- Rektarin skal ansa eftir, at Setrið hevur fakliga dygga leiðslu við denti á góðsku í granskingini og fakliga menningararbeiðinum, undirvísingini og miðlanini.
- Rektarin skal, í samstarvi við setursstýrið, syrgja fyri, at mál og avrikskrøv, sum eru sett í strategi- og fíggjarætlanum, verða hildin og fylgd.
- Rektarin skal syrgja fyri, at øll málsviðgerð er á fullgóðum stigi.
- Rektarin skal syrgja fyri góðum samskifti og kunning millum tey ymsu stigini í stovninum og skapa eina góða stovnsmentan. Rektarin skal eggja til eitt virkið og gott læru- og arbeiðsumhvørvi.
- Rektarin skal syrgja fyri góðum samskifti við hægri myndugleikar, onnur universitet, samfelagið og vinnuna og gera netverk bæði fyri økið, landið og altjóðaliga.
- Rektarin skal gera eitt hóskandi arbeiðsbýti við fyrisitingarstjóran innan fyri karmarnar á galdandi fyriskipan.

## 2. Leikluturin hjá vararektaranum

Vararektarin á Setrinum verður valdur millum dekanarnar og hevur leiklutin sum vararektari saman við leiklutinum sum dekanur.

Høvuðsuppgávurnar hjá vararektaranum eru hesar:

- At virka sum varafólk í sambandi við formligar skyldur hjá Setrinum, tá ið rektarin er í farloyvi ella av øðrum orsøkum ikki er tøkur, so sum at leiða Setursnevndir (t.d. Trivnaðarnevndina ella Samstarvsnevndina) ella fundir (t.d. leiðslufundir), umboða Setrið á fundum við uttanhýsis samstarvsfelagar og við at undirskriva skjøl fyri Setrið (t.d. setanarbrøv, próvbrøv, samstarvsavtalur) og annars soleiðis, sum tað av og á verður kravt og mett hóskandi.
- At ráðgeva og stuðla rektaranum í yvirskipaðu leiðsluni av Setrinum, m.a. við at víðka og menna Setrið, sum tað er orðað í málum og miðum fyri Setrið.
- Í semju og eftir avtalu við rektaran at taka høvuðsábyrgdina av týdningarmiklum uppgávum og verkætlanum, ið eru ætlaðar at menna Setrið og tað uttanhýsis samstarvið, ið er.

## 3. Leikluturin hjá prorektarunum

### *Prorektari fyri útbúgving og góðsku*

Høvuðsuppgávurnar hjá prorektaranum fyri útbúgving og góðsku eru:

- At stuðla rektaranum í at leiða og skipa arbeiðið í Góðskueindini á Fróðskaparsetrinum í samsvari við strategiætlanina *Mál og mið 2020-2024.*
- Saman við leiðslutoyminum á Fróðskaparsetrinum at tryggja, at Fróðskaparsetrið fylgir leiðreglunum í Bologna samstarvinum og ásetingunum í *Standards and Guidelines for Quality Assurance in the European Higher Education Area.*
- Saman við rektaranum og í samskifti við starvsfólk, lesandi og samstarvs- og áhugapartar í samfelagnum at hava umsjón við, hvussu góðskutryggingar- og góðskumenningarpolitikkurin verður settur í verk og sjónliga sæst aftur í arbeiðs- og mannagongdum á Fróðskaparsetrinum.
- At virka fyri einari mentan, sum á gjøgnumskygdan hátt stimbrar áhaldandi menning tvørtur um deildir á Fróðskaparsetrinum, m.a. við einum vælvirkandi tvørdeildarligum góðskumenningarforumi.

### *Prorektari fyri gransking og framtaksvirksemi*

Høvuðsuppgávurnar knýttar at starvinum sum pro-reatari fyri gransking og framtaksvirksemi eru:

- At stuðla rektaranum við at leiða og skipa arbeiðið í Granskingar- og Framtakseindini á Fróðskaparsetrinum sambært strategiskjalinum 2020-2024.
- Saman við restini av leiðslubólkinum á Setrinum at stimbra og stuðla granskingarvirksemi, sum er grundarlagið undir undirvísing, dygdargóðum vísindaligum útgávum, umsóknum um stuðul til gransking- og framtaksvirksemi á Setrinum og samstarvinum við aðrar stovnar.
- At leiða Granskingar- og Framtaksforumið á Setrinum, sum er samansett av deildargranskingarleiðarunum, sum í samstarvi við dekanarnar millum annað:

- Samskipa sambært setursleiðreglum eina sterka tilgongd, har umsóknir um granskingarstuðul verða javnlíkamettar og mentar;
- Virka sum mentor hjá ungum granskarum í tilgongdini at menna teirra granskingarførleikar;
- Taka lut á deildar- og setursstigi í tilgongdini at stuðla ph.d. lesandi;
- Stuðla menningini av framtaksvirksemi á Setrinum;
- Stuðla framleiðsluni av einum árligum granskingar- og framtaksriti á Setrinum

## 4. Starvið hjá fyrisitingarstjóranum

**Fyriskipan fyri fyrisitingarstjóra**
Samtykt á stýrisfundi 17. mars 2010

### *Ábyrgd og myndugleiki*

- Fyrisitingarstjórin er ovasti leiðari í samlaðu umsitingini á Fróðskaparsetrinum innan fyri teir karmar, stýrið og rektarin seta.
- Fyrisitingarstjórin er skrivari í stýrinum og skal í samráði við rektaran fyrireika og geva tilmæli í teimum málum, sum verða løgd fyri stýrið.
- Fyrisitingarstjórin er eisini, sjálvur ella eitt av hansara starvsfólkum, skrivari hjá øðrum leiðslueindum á Setrinum.
- Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av, at fíggjarumsitingin er í samsvari við almennu reglurnar á deildini um fíggjarumsiting og fyritreytirnar fyri tillutan av játtanini.
- Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av, at fyrisitingarligu og umsitingarligu uppgávurnar verða útintar á fulldyggan hátt og í samsvari við ásettar lógir, reglur og leiðreglur, og eisini innan fyri teir fíggjarligu karmar, sum stýrið setir.

### *Aðalstarvssetningur*

- Fyrisitingarstjórin skal arbeiða fyri, at strategiir og mál í granskingini og fakliga menningararbeiðinum og innan fyri útbúgvingar- og miðlanarvirksemið á Setrinum verða ment og sett í verk.
- Fyrisitingarstjórin skal innan fyri fíggjarligu karmarnar, sum stýrið setir, syrgja fyri, at mannagongdir og starvshættir í umsitingini eru fulldygg og av bestu góðsku.
- Fyrisitingarstjórin ger og leggur fyri stýrið fíggjaruppskot og ársroknskap og heldur rektaran kunnaðan so hvørt um roknskaparstøðuna sambært fíggjarætlanini og um annað av týdningi fyri virksemi Setursins.
- Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri, at øll málsviðgerð er á fullgóðum stigi.
- Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri góðum samskifti og kunning millum tey ymsu stigini á stovninum.
- Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri, at Setrið hevur starvsfólka- og lønarpolitisk atføri og virkisætlanir, sum stuðla upp undir mál Setursins.
- Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri, at Setrið hevur skipanir, sum tryggja, at góðskan í gransking og fakligum menningararbeiði og innan fyri útbúgvingar- og miðlanarvirksemi er á hægsta stigi, umframt at gera sítt til, at arbeiðs- og læruumhvørvið er fullgott út frá eini meting við atliti at heilsu, umhvørvi, trygd og vælferð.

- Fyrisitingarstjórin hevur í neyðugan mun og eftir áheitan frágreiðingarskyldu mótvegis setursstýrinum. Bæði fakliga og umsitingarliga/fyrisitingarliga virksemið kemur undir hesa skyldu.
- Fyrisitingarstjórin skal birta undir, at samskifti við hægri myndugleikar, onnur universitet og aðrar samstarvsfelagar, í landinum og altjóða, verður hildið og ment.
- Fyrisitingarstjórin skal stimbra til eitt hóskandi arbeiðsbýti við rektaran innan fyri karmarnar á galdandi fyriskipan.

## 5. Leikluturin hjá dekaninum

**Fyriskipan fyri dekanar á Fróðskaparsetri Føroya**

Dekanstarvið er eitt fulltíðar leiðslustarv, tó so at dekanurin framhaldandi hevur møguleika at fylgja við og menna gransking á sínum fakøki.

### *Leiðslutoymi*

- Rektarin, dekanarnir og fyrisitingarstjórin mynda leiðslutoymið á Fróðskaparsetrinum. Leiðslan skal tryggja gott samskifti og samstarv millum megindeildirnar eins og millum megindeildirnar og miðfyrisitingina.
- Dekanar hava vísandi til rektaran yvirskipaðu ábyrgdina av strategiskari planlegging og at menna megindeildirnar, herundir menna tvørfakligt samstarv og inntøkufíggjað virksemi.
- Til at fylgja við í gongdini í ph.d.-verkætlanum kunnu dekanar seta ph.d.-nevnd við vísindafólkum, sum gevur dekanunum tilmæli í málum av týdningi fyri ph.d.-tilgongdina og er við til at menna mannagongdir, reglugerðir og sáttmálar fyri ph.d.-lesandi.

### *Leiðsla og ábyrgd*

- Dekanur hevur leiðsluna av megindeild og tryggjar dygd og samanhang millum gransking og útbúgving.
- Dekanur hevur vísandi til rektaran ábyrgdina av, at øll gransking, undirvísing og annað virksemi á megindeild, eind v.m. fer fram sambært reglum og málum, sum Fróðskaparsetur Føroya hevur sett sær.
- Dekanur umboðar megindeildina úteftir.
- Dekanur hevur ábyrgd av starvsfólkaviðurskiftum og trivnaði á megindeildini. Í starvsfólkamálum tryggjar dekanur samsvar við ásetingar frá setursfyrisitingini.

### *Fíggjarviðurskifti*

- Dekanur gevur rektaranum ella tí, ið rektarin útlutar til, tilmæli um fíggjarætlan fyri megindeildina.
- Dekanur hevur ábyrgd av fíggjarætlan, sum er tillutað megindeildini.
- Dekanur góðkennir verkætlanir við eksternari fígging í samráð við rektaran

### *Námsskipanir*

- Dekanur góðkennir námsskipanir eftir tilmæli frá settum fakligum bólkum.
- Dekanur góðkennir vegleiðarar til serritgerðir (bachelor, master) og til ph.d.-verkætlanir.

### *Tilmælismál*

- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um varadekan.
- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um starvssetanir, starvsloysnir og starvsfarloyvi.

- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um limir í metingarnevndir fyri akademisk størv.
- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um próvdómarar.
- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um andmælingar til verju fyri ph.d.-heiti.
- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um setan av fakligum bólkum og nevndum at ráðgeva í málum um útbúgving, gransking og strategi.
- Dekanur gevur rektaranum tilmæli um setan av útbúgvingarleiðara fyri útbúgvingarnar á megindeildini.

*Útluting*

- Dekanur kann útluta ábyrgd av skeiðum ella pørtum av útbúgvingum til ábyrgdarlærarar.
- Dekanur kann útluta ábyrgd av starvsstovum, søvnum o.tíl. til medarbeiðarar á megindeildini.

## 6. Leikluturin hjá varadekaninum

**Leikluturin hjá varadekaninum á Fróðskaparsetri Føroya: eitt alment yvirlit, sum skal útgreinast gjøllari fyri hvørja deild og í hvørjum føri.**

Varadekanurin er vanliga lektari ella professari á tí viðkomandi deildini og fær leiklutin tillutaðan frá dekaninum við rektarans góðkenning. Í serligum føri kann rektarin góðkenna, at starvsfólk í øðrum starvi kann fáa leiklutin sum varadekanur tillutaðan (t.d. námslektari ella undirvísari).

Vanliga verður væntað, at tann í leiklutinum sum varadekanur skal:

- virka sum varafólk, um dekanurin er burturstaddur ella á annan hátt hindraður í at virka;
- hjálpa dekaninum í teirri dagligu stýringini á deildini í samráð við dekanin;
- hjálpa dekaninum at leiða og stýra deildini í samsvari við Fróðkaparsetursins menningarætlan.

Leikluturin sum varadekanur verður stuðlaður við eini tillutan, sum er 20% av fulltíðarstarvi, treytað av neyvari útgreinan av ábyrgdarøki. Tann endaliga tillutanin av tíð skal altíð gókennast av rektaranum. Leikluturin sæst vanliga aftur í hægri løn.

## 7. Leikluturin hjá útbúgvingarleiðarum

**Lýsing av starvsøkinum hjá útbúgvingarleiðarum**

*Bygnaður, ábyrgdir og heimildir*

Dekanurin tilnevnir útbúgvingarleiðarar fyri eitt trý ára tíðarskeið (kann leingjast) á ávísum útbúgvingarøkjum. Útbúgvingarleiðarin, ið vísir til dekanin, skal hava góðan kunnleika til fakøkið og góðar royndir við undirvísing. Útbúgvingarleiðarin er partur av deildarleiðsluni.

Útbúgvingarleiðarin hevur ábyrgd av, at útbúgvingin fylgir galdandi góðskutryggingarskipan á Fróðskaparsetrinum, at hon er í samsvari við námsskipan, strategi og mál hjá Fróðskaparsetrinum, og at hon verður dagførd og eftirmett eftir ásettum mannagongdum.

Útbúgvingarleiðarin veitir í samstarvi við deildarskrivstovuna dagførda kunning um útbúgvingina, einstøku skeiðini og próvtøkur til Próvbókina og heimasíðuna hjá

Fróðskaparsetrinum. Kunning til lesandi um skeið, undirvísing og próvtøkur verður givin umvegis kunningar- og skeiðssíðurnar í Moodle.

Útbúgvingarleiðarin hevur sambært avtalu við dekanin heimild at gera avtalur um undirvísing við starvsfólk (t.d. laborantar), vísindafólk og leysalærarar innan fyri fíggjarkarmin fyri útbúgvingina.

Í útbúgvingum, har starvsvenjing ella klinikk er partur, kann útbúgvingarleiðarin ella kliniski útbúgvingarleiðarin útluta samskifti við starvsvenjingarstøð og klinikkir til annað starvsfólk.

### *Umsitingarlig viðurskifti*

Útbúgvingarleiðarin samskiftir við undirvísarar og deildarskrivstovuna um skeiðslýsingar og at leggja undirvísing og próvtøkur til rættis. Útbúgvingarleiðarin ger tilmæli til dekanin um próvdómarar.

Vegleiðingarætlan, uppgávuorðingar og innlatingarfreistir fyri bachelor-, master- og aðrar ritgerðir skulu útbúgvingarleiðarar ella vegleiðarar góðkenna eftir góðkenning frá dekaninum.

Útbúgvingarleiðarin stílar fyri, at umsóknir um góðskrivingar verða fakliga mettar, og at metingarnar verða sendar lestrarráðnum til góðkenningar.

Umsóknir um góðskriving av frammanundan góðkendum skeiðum kunnu avgreiðast á lestrarskrivstovuni. Lestrarráðið og útbúgvingarleiðarin skulu kunnast um umsóknir, sum lestrarskrivstovan hevur avgreitt.

Í sambandi við upptøku av lesandi luttekur útbúgvingarleiðarin eftir áheitan frá lestrarskrivstovuni.

Útbúgvingarleiðarin fylgir lestrargongdini hjá teimum lesandi. Útbúgvingarleiðarin avgreiðir umsóknir frá lesandi um lestrarfarloyvi og kunnar deildarskrivstovuna og Próvbókina um játtað farloyvi.

### *Fíggjarviðurskifti*

Útbúgvingarleiðarin samskiftir við dekanin um fíggjartørv til útbúgvingina, leggur undirvísingina til rættis sambært tillutaðum fíggjarkarmum og kann eftir tørvi hava atgongd til BSL-skipanina á Gjaldstovuni til tess at fylgja við útreiðslunum.

### *Arbeiðsbyrða og viðbót*

Arbeiðsbyrðan kann væntast at vera ymisk frá útbúgving til útbúgving. Hvør útbúgvingarleiðari avtalar við avvarðandi dekan, hvussu nógvari arbeiðsorku tørvur er á til at vera útbúgvingarleiðari (vanliga millum 25% og 50%). Arbeiðstíðin verður vanliga tillutað av undirvísingarskylduni hjá vísindafólkunum.

Uppgávan sum útbúgvingarleiðari verður lønt sum deildarleiðari-I eftir AKF-sáttmálanum.

## 8. Leikluturin hjá granskingarleiðaranum á deildini

**Lýsing av leiklutinum hjá deildargranskingarleiðara á Fróðskaparsetrinum**

Hetta skjalið lýsir høvuðsuppgávurnar hjá granskingarleiðaranum á Setrinum. Granskingarleiðarin er partur av deildarleiðsluni og er undir leiðslu av dekaninum. Granskingarleiðarin hevur tætt samstarv við Granskingar- og framtakseindina og við aðrar

granskingarleiðarar. Uppgávurnar hjá granskingarleiðaranum eru tillagaðar umstøðunum og kunnu vera ymiskar frá deild til deild.

- At hjálpa dekaninum við at leiða menningina av gransking og framtaki í samsvari við mál og mið fyri Setrið 2020-2024.
- At virka fyri og stuðla undir granskingarvirksemið, ið er við til at styrkja útboðið av útbúgvingum, góðskuna av útgivnum verkum, umsóknir til uttanhýsis fígging og samstørv við samstarvsfelagar.
- At samstarva tætt við Granskingar- og framtakseindina sum umboð fyri dekanin og deildina, m.a.
    - sambært leiðreglum á Setrinum samskipa eina haldgóða tilgongd at javnlíkameta umsóknir um fígging;
    - luttaka í fundum hjá granskingar- og framtaksnevndini á Setrinum, tá ið Granskingar- og framtakseindin kallar nevndina saman, og greiða nevndini frá gongdini;
    - at hjálpa til við at leiðbeina nýggj starvsfólk við at gera og betra teirra granskingarprofil;
    - stuðla undir, at arbeiðið við framtaki verður ment;
    - stuðla undir, at ein ársfrágreiðing verður skrivað um gransking og framtak á Setrinum
- Um tað er hóskandi, kann granskingarleiðarin fáa leiðaraábyrgd av summum starvsfólkum.

Leikluturin sum granskingarleiðari verður vanliga lønt við viðbót.

*Góðkent hevur leiðslutoymið í september 2020*

## 9. Starvið hjá professarum

Høvuðsuppgávan hjá einum í starvi sum professari er vísindalig gransking (m.a. at geva og breiða út vísindaligt tilfar) og at undirvísa í gransking við kravdum próvtøkum. Uppgávan umfatar eisini at veita samfelagnum vitanina og vera við í almenna kjakinum. Granskingaruppgávur frá landsstýrinum kunnu eisini verða umfataðar sum partur av starvinum.

At leiða granskingina, leiðbeina adjunktar og gera akademiskar metingar er eisini partur av starvinum.

Setrið ger av, hvussu býtið millum tær ymsu uppgávurnar er.

Umsókn til eitt professarastarv ella umsókn um at verða framfluttur til professara verður mett út frá teimum førleikum, ið eru kravdir og lýstir í hesum skjali og í starvslýsingini. Umsøkjarin skal skjalprógva førleikar bæði í vísindaligari gransking og í vísindaligari undirvísing og skal eisini hava fyrisitingarligar førleikar. Tað skal skjalprógvast, at umsøkjarin hevur megnað sjálvstøðugur at lata vísindaligt tilfar á høgum stigi úr hondum innan fyri eitt ávíst fakøki, t.d. hava givið greinar út javnlíkamettar í tíðarritum á høgum stigi ella útgivið verk, sum eru á samsvarandi høgum stigi. Umframt verður áherðsla løgd á eina meting av førleikum til at standa fyri vísindaligari gransking og útbúgvingarleiðslu (t.d. at vegleiða ph.d.-verkætlanr) og fyri øðrum leiðsluuppgávum, t.d. í sambandi við uttanhýsis samstarv hjá Setrinum og førleika at útvega uttanhýsis fígging til gransking og fullgera verkætlanir, ið eru fíggjaðar, á fullgóðan hátt.

## 10. Adjungerað størv

### a. Adjungerað størv á Fróðskaparsetri Føroya

Fróðskaparsetur Føroya (stytt Setrið) strembar eftir at røkka teimum málum, ið ásett eru í strategiætlanini (sí Strategiskjal 2020-24). Setrið gleðist um at kunna knýta væl skikkað

vísindafólk aftur at akademiska starvsfólkahópinum við at seta tey sum adjungerað. Endamálið við hesum tilknýtinum er at skapa samstørv, sum eggja adjungeraðum at vera við í menningini av Setrinum. Setrið strembar fram ímóti at stuðla teimum útnevndu, so at allir partar fáa gleði av samstarvinum.

Vísindafólk, ið átekur sær starvið sum adjungerað, skal geva sítt íkast til ta menning og gransking, sum fer fram á Setrinum. Vísindafólkið skal klárt vísa sítt tilknýti sum adjungerað á Setrinum og umboða tey sjónarmið, sum Setrið stendur fyri. Adjungerað skulu støðugt umboða Setrið sum sín hjástovn í gransking og undirvísing. Setrið er ikki fremsti arbeiðsgevari, og tí hevur adjungeraða vísindafólkið bert skyldur, ið hava beinleiðis samband við avtalaða íkastið til Setrið.

*Tilnevning*

Tann, ið tilnevnast skal, letur avvarðandi dekani umsókn til metingar. Dekanurin leggur síðani umsóknina fyri fyrisitingarstjóran. Umsóknin skal millum annað byggja á førleikar, arbeiðsroyndir, hvørjar aðrar stovnar viðkomandi er knýttur at, hvussu væl viðkomandi er skikkaður at verða tilnevndur, faklig úrslit og serliga grundgeving fyri at verða tilnevndur. Eisini skal lýsast, hvørji faklig íkøst umsøkjarin sum adjungeraður kann leggja aftur at menningini av Setrinum. Umframt dekanin ber til hjá viðkomandi starvsfólki á deildini at koma við viðmerkingum til tilnevningina. Tilnevningin fær endaliga góðkenning frá rektaranum og stýrinum.

Høvuðsskyldur hjá Fróðskaparsetri Føroya

- At koma ásamt við tann, ið adjungerast skal, um íkastið til starv og menning av deildini og Setrinum, sum viðkomandi í høvuðsheitum fer at hava í setanartíðini, og at veita allan skilabornan stuðul til hesa ætlan.
- Vísandi til omanfyristandandi:
  - Tryggja, at adjungeraði gerst partur av umhvørvinum á Setrinum og fær samstarv við fakliga relevantar starvsfelagar.
  - Tryggja, at adjungeraði hevur atgongd til eitt arbeiðspláss á Setrinum, tá ið brúk er fyri hesum, og fær tillutað t-postadressu frá Setrinum.
  - At stuðla adjungeraða við granskingarumsóknum, sum viðvíkja teirra virksemi á Setrinum.
  - At stuðla adjungeraða at fullføra fíggjaðar verkætlanir, sum Setrið hevur bundið seg til at fyrisita.
  - At kunna starvsfólk á Setrinum um tilnevningina og kunna um virksemi hjá adjungeraða til aðrar relevantar málbólkar.
  - At samstarva við adjungeraða um at skipa fyri avtalaðum undirvísingaruppgávum.

Høvuðsábyrgdarøki hjá adjungeraða:

- Í samstarvi við Setrið og dekanin at finna fram til tað íkast, sum ætlanin er, at tann adjungeraði skal geva Setrinum, ta tíðina viðkomandi er knýttur at Setrinum. Til hetta verður eggjað til uppfylgjandi samrøður til tess at tryggja, at framgongdin er støðug.
  - Tey øki, adjungeraði kann taka lut í, eru millum annað: íkast til undirvísing, eitt nú sum ábyrgdarlærari fyri ávís ella ymisk skeið. Vera vegleiðari til BSc-, MSc- ella ph.d.-verkætlanir. Samstarva við dekanin og deildina um granskingarverkætlanir og útgávur og at søkja um uttanhýsis fígging til hesi endamál. Vegleiða og stuðla starvsfólki á Setrinum á ymiskan hátt. Umboða Setrið í ymiskum uttanhýsis samstørvum, stimbra almennan áhuga við tí endamáli at styrkja umdømi Setursins, veri seg tjóðarliga ella altjóðaliga.

- Setrið lønir øllum tilknýttum adjungeraðum mánaðarliga viðbót. Viðbótin verður grundarlagið fyri tí íkasti, adjungeraði skal veita Setrinum. Tó verður grundarlagið eitt annað, um viðkomandi hevur tyngri uppgávur enn tær, ið væntast verða hildnar. Meirkostnaður til lønir hjá adjungeraðum skulu leggjast fyri dekanin og rektaran til støðutakan.
- Setrið eigur at hava sítt tilknýti til almenna profilin hjá adjungeraða, tað veri seg á greinum, útgávum, vísindaligum framløgum, undirvísingum ella í almennari miðling.
- Væntað verður, at adjungeraði megnar at laga seg til tær umstøður, ið eru á Setrinum, serliga tá ið hugsað verður um spurningar, sum hava við tign og fjølbroytni at gera. Somuleiðis um inklusjón, etikk og fakligt trúvirði.

*Samtykt hevur leiðslan á Fróðskaparsetrinum (rektari, fyrisitingarstjóri og dekanar), 5. juni 2020. Góðtikið á samstarvsnevndarfundi 8. juli 2020. Í gildi frá 15. juli 2020*

### b. Tilnevningarskjal til adjungerað starv á Fróðskaparsetri Føroya

Hetta tilnevningarskjalið skal útfyllast av tí starvsfólki, sum ger tilnevningina, og skal latast stýrisforfólkinum á Fróðskaparsetrinum saman við heilum lívsrensli (cv) og viðmælum hjá tí tilnevnda.

- Navn á tilnevnda umsøkjara:
- Starv sum umsøkjari verður nevndur til:
- Starvsfólk, sum ger tilnevningina (vanliga dekanurin á viðkomandi deild):
- Høvuðsútbúgving hjá tilnevnda (útbúgving, lestrarstovnur; nær lesturin fór fram og próvtøka):
- Viðkomandi royndir í høvuðsheitum og núverandi og fyrrverandi starvsheiti og stovnssamband:
- Høvuðsgransking og útgávur at varpa ljós á:
- Hvør er tilelvingin til at seta tilnevnda í starv, og hvat er íkastið, sum tilnevndi fer at lata Fróðskaparsetri Føroya, um tilnevningin verður góðtikin?
- Viðmerkingar frá starvsfólki á viðkomandi deildini (skal útfyllast áðrenn innlating):
- Undirskrift hjá tí, sum tilnevnir:
- Dagfesting:
- Viðmerkingar frá øðrum deildardekanum:
- Rektarans endaliga avgerð:
- Starvstíðarskeið:

## Mannagongd og kravd skjalfesting fyri framflytingar millum undirvísingarstørv og granskingarstarvslið

### c. Mannagongd: Leiðreglur um framflytingar av verandi vísindaligum starvsfólki á Fróðskaparsetri Føroya

*Endamálið*

Leiðreglurnar eru skrivaðar fyri at hjálpa dekanum, starvsfólki í fyrisitingini og vísindastarvsfólki á Setrinum, ið eru í uppskoti til framflyting.

### *Metingarnevnd*

Í sambandi við umsókn um framflyting av vísindastarvsfólki setir rektarin eftir tilmæli frá dekani eina metingarnevnd, hvørs limir skulu hava minst sama førleika, sum krevst til starvið, ið søkt verður um framflyting til. Minst tveir av limunum í metingarnevndini skulu vera frá øðrum universiteti ella granskingarstovni.

### *Mannagongd*

Verandi vísindastarvsfólk kann sjálvt biðja um framflyting, og eisini kann avvarðandi dekanur/leiðari innstilla vísindastarvsfólkið til framflyting.

1. Dekanurin kunnar rektaran um ynskið um framflytingin. Um rektarin játtar, verður metingarnevnd sett.
2. Dekanurin skjýtur upp limir til metingarnevndina, velur forfólk og sendir tilmæli um metingarnevndina til rektaran til góðkenningar. Sum meginregla skal forfólkið vera vísindastarvsfólk á Setrinum.
3. Dekanurin kunnar umsøkjaran um, hvør situr í metingarnevndini, og hvør er forfólk.
4. Dekanurin sendir tilfarið, sum skal sendast til limirnar í metingarnevndini, til fyrisitingina.[1]
5. Fyrisitingin sendir tilfarið og viðkomandi skjøl til metingarnevndina.
6. Forfólkið í metingarnevndini sendir metingina aftur til fyrisitingina.
7. Fyrisitingin sendir metingina til dekanin, sum sendir metingina til umsøkjaran til hoyringar. Umsøkjarin hevur 8 daga freist at senda dekaninum sínar viðmerkingar.
8. Avvarðandi dekanur sendir metingina og viðmerkingarnar frá umsøkjaranum til allar dekanarnar og fyrisitingarstjóran at viðmæla, og viðmælið verður sent rektaranum. Rektarin tekur endaliga avgerð um framflytingin. Rektarin kunnar avvarðandi dekan og fyrisitingina um avgerðina.
    - Verður umsóknin ikki gingin á møti, hevur avvarðandi dekanur ein fund við umsøkjaran um niðurstøðuna frá metingarnevndini. Umsøkjarin kann við støði í metingini sum heild, og um niðurstøðan í metingini letur upp fyri tí, gera avtalu við dekanin um nýggja freist. Rektarin góðkennir avtaluna.
9. Um umsóknin verður gingin á møti, kunnar dekanurin umsøkjaran og starvsfólk á deildini.
10. Dekanurin sendir upplýsingar til kunningarfólkið, sum leggur tíðindini á Setursnetið.
11. Um framflyting er viðkomandi fyri almenningin ella á annan hátt hóskandi til heimasíðutíðindi, kann kunningin leggjast út á heimasíðuna.
12. Kunningarfólkið broytir starvsfólkaheitið á heimasíðuni.
13. Starvsfólk á HR-deildini ger setanarbræv og kunnar fíggjardeildina.
14. Fyrisitingin sendir takkarbræv til metingarnevndina saman við gjaldsskjali.
15. Fíggjardeildin tryggjar, at limirnir í metingarnevndini fáa samsýning.

### *Regluverk*

Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012

Reglugerð fyri skipan av Fróðskaparsetri Føroya, grein 7

Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya

*Samtykt av leiðsluni (dekanum, fyrisitingarstjóra og rektara) á Fróðskaparsetri Føroya 5. juni 2020*

[1] Fyrisitingarstjóran ella starvsfólk á HR-deildini

d. **Kravd skjalprógv: Umsókn frá akademiskum starvsfólki um at verða virðismett til framflyting**

Áðrenn umsóknin verður latin inn til stýrisforfólkið á Fróðskaparsetrinum, skal hon viðgerast saman við viðkomandi deildardekani. Hon skal latast inn saman við heilum akademiskum cv (íroknað akademiska útbúgving, fyrrverandi størv, undirvísingarroyndir og ritgerðarumsjón á bachelor- og meistarastigi, útgávur (týðiliga skiljandi ímillum javnlíkamett tilfar og annað), fíggjarstuðul, ph.d.-umsjón, ávirkan av tínum arbeiði, almennar uppgávur, viðkomandi fyrisitingarligar royndir o.s.fr.) og avrit av ikki fleiri enn 5 av týdningarmestu granskingarúrslitum umsøkjarans.

Tá ið tú skrivar tína umsókn og leggur títt cv fram, er tað gagnligt at taka strategiætlanina *Mál og mið 2020-2024* til eftirtektar.

Tá ið hon er innlatin, verður umsóknin viðgjørd av leiðsluni á Fróðskaparsetrinum, og um tað er hóskandi, verður ein setanarnevnd sett, vanliga við forfólki millum innanhýsis starvsfólk og við uttanhýsis metarum við servitan á tí evnisøki, talan er um.

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Deild: | |
| Starvssetan á Fróðskaparsetrinum: | |
| Núverandi starvsheiti og evnisøki: | |
| Søkir um at verða virðismett/ur til (vinarliga tilskila starv): | |

Vinarliga legg títt mál um framflyting fram á *í mesta lagi tveimum síðum* (skrift Calibri (Body), stødd 11). Vinarliga vís til "Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya" (er á heimasíðuni hjá Setrinum) og "Fróðskaparsetursins menningarætlan 2020-2024*"*. Vinarliga ger leinki til títt cv og gev haldgóð prógv, at tú:

- Hevur lokið kravt støði í akademiskari útbúgving og servitan á tínum øki ("hægsta støði" fyri professara og "sera høgt støði" fyri lektara – sum skal prógvførast týðiliga við tilvísing til granskingaravrik og undirvísing við støði í gransking);
- Hevur víst kravt "gott námsfrøðiligt hegni" (sum sæst í undirvísingarroyndum, tilgongd í undirvísing og læring, úrslitum hjá lesandi, eftirmeting teirra lesandi, og hvussu tú brúkar hana til at gera undirvísingina betri, o.s.fr.);
- Hevur rokkið kravt støði í fyrisitingarligum royndum ("víðfevnandi" um talan er um professarar).
- Til framflyting til professara skalt tú vinarliga eisini prógva, hvussu tú hevur tikið "ta yvirskipaðu ábyrgdina av granskingardygd og undirvísing" á tínum evnisøki og á sjálvstøðugan hátt ment títt evnisøki við vísindaligari gransking á høgum stigi.
- Hevur lutað tína servitan á munagóðan hátt við almenning uttan fyri akademiska heimin, og/ella tikið lut í almennum kjaki.

- At enda, vinarliga vís á, hvussu tú hugsar tær, at títt íkast í eini framfluttari støðu fer at hjálpa til við at fremja ætlanir og raðfestingar í *Fróðskaparsetursins menningarætlan 2020-2024.*

**END OF DOCUMENT**